

TOYOTA AVENSIS 2.4 SOL AUT. — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KP 008 **Km:** 19.000
**Árgangur:** 14.06.2006

**kr. 264.000,-**



TOYOTA AVENSIS 1.8 ICO — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LD 542 **Km:** 176.725
**Árgangur:** 22.10.2003

**kr. 148.000,-**



TOYOTA RAV 4 2,0 VVT-I — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VS 482 **Km:** 30.000
**Árgangur:** 04.09.2006

**kr. 274.000,-**



TOYOTA COROLLA 1.6 H/B

**Skrásetingarnr:** UH 762 **Km:** 89.000
**Árgangur:** 06.02.2004

**kr. 135.000,-**



PEUGEOT 306 2.0 HDI

**Skrásetingarnr:** TR 147 **Km:** 187.000
**Árgangur:** 01.01.2001

**kr. 48.000,-**



MAZDA B2500 D, MVG BILUR

**Skrásetingarnr:** EV 679 **Km:** 69.000
**Árgangur:** 30.07.2002

**kr. 78.000,-**



MAZDA 6 — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** EL 469 **Km:** 47.000
**Árgangur:** 16.09.2005

**kr. 172.000,-**



TOYOTA AVENSIS 2.0 TD

**Skrásetingarnr:** LU 900 **Km:** 125.000
**Árgangur:** 19.08.1999

**kr. 75.000,-**



MAZDA 626 2.0 TDI

**Skrásetingarnr:** SV 702 **Km:** 213.000
**Árgangur:** 10.11.1998

**kr. 64.000,-**



TOYOTA COROLLA 1.6 LUNA B. H/B — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TG 470 **Km:** 50.000
**Árgangur:** 11.05.2005

**kr. 158.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Hátíðarløta í Svínoy



*Húsini úti á Bø eru frá 1862*

HÁTÍÐARHALD

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Komandi leygardag verður ein serligur dagur úti í Svínoy. Til ber at síggja húsini Úti á Bø, sagt verður frá søgur og avintýr, greitt verður frá kirkjuni og kirkjugarðinu, og Tórshavnar manskór fer at syngja.

Skráin fyri dagin er hendan:

Húsini »úti á Bø« verða víst fram frá klokkan 13 til 15. Hesi húsini eru frá 1862.

Óli á Geilini ferð at siga frá søgur og sagnir og ævintýr klokkan 15-16

Heri Joensen prestur fer at siga søguna um kirkjuna og kirkju garðin klokkan 16-17.

Skjóttgangandi báturin hjá Norðlýsinum fer at sigla undir Svínoynna.

Tórshavnar manskór fer at syngja í kirkjuni kl 19 - 20.30

Másin siglir eykatúr úr Hvannasundi klokkan 12 til Svínoyar og út aftur eftir fólki klokkan 22 úr Hvannasundi. Siglitíðin er umleið 45 minuttir.

# »Gaman og Álvara« nú á fløgu

**Í gjár kom leingi saknaða útgávan »Gaman og Álvara«, hjá Hanus G. Johansen, har hann til egin løg tulkar yrkingar eftir Poul F. Joensen**

TÓNLEIKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*





Upprunaliga útgávan, ið var á LP-plátu og kasettubandi, kom út í 1988. Tað eru somu upptøkurnar, sum eru endurnýttar. Tónleikurin er nú talgildur og re-mastraður og kemur á fyrsta sinni út á fløgu.

Tónleikarararnir, ið eru við á útgávuni, eru úr Føroyum, Danmørk og Svøríki og vóru millum teir fremstu á norðurlendska tónleikapallinum í 80'unum. Tað var Jóhannus á Rógvu Joensen, ið var samskipari av verkætlanini.

Upprunaliga útgávan kom í samband við 90 ára føðingardagin hjá Poul F. Joensen. Síðani eru tulkingarnar av skemti- og kærleiksyrkingunum hjá Poul F. vorðnar fólkaogn, og er tað ikki minst hesi útgávuni fyri at takka.

Tónleikurin av 1988-mastaranum er fluttur til nútíðar talgilt format á Nasjonalbiblioteket, Mo i Rana í Noregi. Og Master Touch v/ Lehnert Kjeldsen hevur mastrað tónleikin av nýggjum í 2008.

Tað er Forlagið KISA v/Hanus G. Johansen, ið gevur hana út.